# Eivør gevur fløgu út í Íslandi

**Mikudagin kom nýggja fløgan hjá Eivør Pálsdóttir á gøtuna í Íslandi.**

**Fløgan hja framúrskarandi føroyska songlerkinum hevur fingið heitið "Kráka".**

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*
*runar@sosialurin.fo*

Eivør Pálsdóttir er eftirhondini eitt nærum eins kent navn í Íslandi sum í Føroyum. Síðan hon flutti til Íslands fyri hálvumøðrum ári síðan, hava íslendingar hoyrt alt meira til hana, og eftir luttøkuna í íslendsku undankappingini til Eurovision Songcontest hevur Eivør verið vanligur gestur í íslendskum pallum og fjølmiðlum.

Mikudagin gav Eivør saman við íslendska bólki sínum fløguna "Kráka" út í Íslandi. Eivør syngur eitt lag á fløguni á íslendskum. Hini verða øll sungin á føroyskum. Eivør eigur sjálv øll løgini á fløguni uttan tvey. Hesi eru gomul føroysk sjøldur. Tað er íslendska plátufelagið 12 tónar, sum stendur fyri útgávuni.

Men meðan teir fyrstu íslendingarnir longu hava ognað sær fløguna hjá Eivør, mugu føroyingar brynja seg við tolni, tí ikki fyrr enn sunnudagin 23. november hevur Eivør útgávukonsert í Føroyum. Tann konsertin verður í Norðurlandahúsinum. Fløgan kemur á søluhillarnar í Føroyum dagin eftir.

Komandi týsdag hevur Eivør og bólkur hennara útgávukonsert í íslensku operaini í Reykjavík, og tað tykist sum íslendingar fjølmiðlar hava stóran áhuga fyri hesum tiltaki og Eivør sum heild.



*Songlerkurin Eivør er klødd sum kráka á húsanum til nýggju fløgu hennara*




BYLGJAN
til sølu

| | | | |
|---|---|---|---|
| Slag: | Útróðrarbátur | Tilfar: | Eik/bók |
| Longd: | 13,01 m | Breidd: | 4,36 m |
| Djúpd: | 2,46 m | Bruttovekt: | 21,6 t |

Fiskiloyvi 4A 77/154 dagar
(lína/snella) + 30/60 dagar á Føroya Banka
Motorur: Caterpillar 65,4T (1993)
Megi: 210 HK Mesta ferð: 11 míl
Øll vanlig nautisk útgerð. 24 volt ravmagn. 4 elvágasnellur og línuspæl. Eyka aluminiumsbrúgv fylgir við. Báturin er í fiskiklárum standi.

www.batasolan.com
Søla, keyp og umbýti av nýggjum og brúktum fiski-, ali- og frítíðarbátum
... vit eru hollir í bátaráðum!

BÁTASØLAN
v/ Sámal J. Joensen
Sundsvegur 11 • FO-100 Tórshavn
tel 32 16 66 • fax 32 17 66 • far 21 38 00
info@batasolan.com • www.batasolan.com


## Eivør vann altjóða heiðursløn

**Í eini árligari kapping, nevnd Song Expo, vann Eivør Pálsdóttir fyrstu heiðurslønina millum 2000 sangir. Hetta var í evninum latínsangir og Eivør tók lut við lagnum, sum hon sang í íslendska Grand Prixnum. Tó við enskum teksti í hesi kappingini og vann lagið heitið sum "Best Latin Song 2003"**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Benelux International Song & Culture Festival skipar árliga fyri stórari sangkapping, Song Expo. Kappingin er í oktober og í ár komu fleiri enn 2000 løg inn úr øllum heiminum.

Eivør Pálsdóttir tók lut við íslendska grandprixlagnum "Í nótt". Friðrik Erlingsson, (fyrrverandi limur í Sugarbabes við Bjørk á odda), skrivaði enskan tekst til lagið; Tonight (my love..). Thór Kormóðsson skrivaði lagið.

Lagið fekk fyrsta pláss, "Number one award", sum "Best Latin Song 2003".

### Airwaves

Eivør tók lut á stóra íslendska festivalinum Iceland Airwaves og útselt var til hennara framførslur. Nógvir fjølmiðlar og fólk innan altjóða tónleikaídnaðin fylgdu tiltakinum. Heimildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð sigur, at fleiri teirra fegnaðust um Eivør og framførslur hennara, so ilt er at siga, hvat hetta gevur Eivør í møguligum framtíðarútlitum, men áður hevur festivalurin verið lopfjøl út í heim hjá íslendskum bólkum.

Eivør er eisini í øllum íslendskum fjølmiðlum og tá festivalurin verður umrøddur, so verður hennara tónleikur spældur.

Og at hava vunnið altjóða heiðursløn setir so heldur ikki Eivør í skugganum á alheims tónleikapallinum, so tað tykist ganga fram á hjá Eivør í royndunum at koma sær fram. Føroyingar kunnu fegnast um nýggju fløgu hennara, sum kemur í næstum.




FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum



SAMSUNG R210S
Lítil og løtt frá Samsung
wap, T9, spøl o.m.a.
einans 849 kr.



SAMSUNG C100
Allar hentleikar:
Litskýggi 65000 litir, tjúkd: einans 17mm,
40 polyfoniskar ringitónar.
einans 1.599 kr.



SAMSUNG A800
Einans 68g.
Voice-memo, tveir skýggjar
polyfoniskar ringitónar
einans 1.799 kr.

TELEBÚÐIN

Tilboðini eru galdandi so leingi, vøra er á goymslu. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum

+298 303030 www.tele.fo

| Tórshavn | Miðvágur | Klaksvík | Sandur | Tvøroyri | Saltangará |
|---|---|---|---|---|---|
| 317010 | 332000 | 404500 | 361000 | 371000 | 404400 |







Kom og fá íblástur

# Vinnudagurin 2003 í Norðurlandahúsinum 7. novembur

| | |
|---|---|
| 12:30 | Í sambandi við at Føroya Arbeiðsgevarafelag fyllir 60 ár, bjóðar felagið luttakarunum á Vinnudegnum til ein bita í Norðurlandahúsinum. |
| 13.30 | Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vilhelm Johannesen bjóðar vælkomin |
| 13.35 | Landsstýsmaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard |
| 13.45 | "Fra lokal til global", Hans Kirk, stjóri í Danfoss |
| 14.15 | Nevndararbeiði, Vinnuhúsið |
| 14.45 | Steðgur – Kaffi |
| 15.15 | Er det muligt at finde ud af, hvad forbrugerne vil have, inden de selv ved det? Fokus på de nyeste fødevaretrends og anvendelsen af trends i fremtidens produktionsudvikling, Jakob Søndergaard, stjóri í Pej-gruppen - Sponsorerað av Granskingarráðnum |
| 16.00 | "Værdibaseret Ledelse. Opnåelse af virksomhedens og medarbejdernes fulde potentiale", Jens Moberg, EMEA vice president Evropa, Microsoft |
| 16:30 | Tá tað regnar á prestin, dryppar á deknin, Jógvan Fríðriksson, prestur |
| 17.00 | Stuttur steðgur |
| 17.15 | Heiðursprógv fyri serligt átak |
| 17.30 | Ársins virkið 2003 verður kosið |
| 17.50 | Liðugt í Norðurlandahúsinum |
| 19.30 | Galladøgurði á Hotel Føroyum |

**Tilmelding innan 30. oktobur** á www.industry.fo ella við at ringja til Vinnuhúsið.

Stuðlað Vinnudegnum hava

R. C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn
Tel 31 18 64, Fax 31 72 78
industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
House of Industry